## Bygda- og økismenning
### - fyrilestur

Leygardagin 7. september heldur skotin Stuart Black, búskaparfrøðingur, fyrilestur um bygda- og økismenning. Stuart Black er deildarstjóri á Highland and Islands Enterprise (HIE) í Skotlandi, ið ráðgevur og fíggjar burðardyggar verkætlaninir innan bygda- og økismenning. Fyrilesturin fevnir um hesi evni:

1. Hvussu er HIE skipað og hvussu starvast tað fyri at fremja setningin um bygda- og økismenning
2. Ítøkilig dømi úr Skotlandi um menningarprojekt, har HIE hevur verið við:
   a. Lokal (bottom-up) tilgongd til bygdar- og økismenning
   b. Vitanin hjá bygdarfólki sum tilfeingi í ferðavinnuni
   c. Lokalt framleidd orka sum liður í bygdarmenning
   d. Mentan og list sum tilfeingi í bygda- og økismenning

Fyrilesturin verður í skúlanum í Funningsfirði leygardagin kl. 10-12. Fyrilesturin varir í ein tíma, og aftaná verða spurningar/orðaskifti. Fyrilesturin, ið verður á enskum, vendir sær til fólk, ið eru virkin innan bygda- og økismenning, tað veri seg vinnuliga, politiskt ella mentannarliga.

Pláss er fyri 25 fólkum. Tilmelding hjá Granskingardeplinum fyri Økismenning í seinasta lagi 29. august.

Heimasíðan hjá Highland and Islands Enterprise er **www.hie.co.uk**

**Granskingardepilin fyri Økismenning**
Tlf. 45 77 44
Fax 45 77 43
www.region.fo · region@region.fo



## LÆR ZONETERAPI

**Et vidunderlig yrke**
**Nytt kurs starter i september på Færøerne**

**Utdannelsen består av:**
Undervisning i praktisk zoneterapi, anatomi / fysiologi, alternativ sykdomslære, øreakupunktur, ernæringslære, østens alternative teorier, massasje, vitamin- og minerallære, klientbehandling m.m.
*Eksamen i juni 2003.*

Vår utdanning er i løpet av 2000 / 2001 blitt omarbeidet og udvidet så kravene til de nye reglene for fritak av mvg, 660 lektioner (imot tidligere 400 lektioner) er til stede for de elever som ønsker det. Utdanningen deles i 3 moduler 300 lekt. + 60 lekt. + 300 lekt.

1. modul avvikles med en intensivweekend pr. mnd. + månedlige gruppearbeider med lærer og er meget intensivt opplagt og fører fram til zoneterapi på proffesjonelt nivå. Utdanningen er med annet godkjent av SAMMENSLUTNINGEN AV ALTERNATIVE BEHANDLERE I DANMARK (S.A.B.), NORSKE NATURTERAPEUTERS HOVEDORGANISASJON (N.N.H.), NORSK FORENING FOR SONETERAPEUTER m.m.

Undervisningen følger den kjente danske zoneterapeut Lilian Holst's anerkjente undervisningsopplegg og gis av lærer med over 30 års undervisningserfaring og mange års stor erfaring fra egen klinikk. Undervisningen og læremateriell er på meget lettfattelig skandinavisk.

**Vestegnens Zoneterapeutskole**
Danmark

Ring eller skriv etter kursprogram fra:

**Føroya Natúrmedisinska Klinikk**
Sundsvegur 10 • FO-100 Tórshavn
Tlf. 320395 kl. 09.00-11.00 og kl. 19.00-21.00 alle dager • Fax hele døgnet: 320396






**DELL Dimension 4500**



Intel 1,8 GHz
256 Mb RAM
40 Gb harðdisk
**19" skerm**
DVD
CD-brennara
3 ára garanti
**kr. 15.900,-**



**DELL**
**TOSHIBA**
Farteldur til einhvønn tørv - prísir úr **kr. 12.995,-**



**DVD** Spælari,
Kodufríður
**kr.1.995,-**



**Canon SmartBase**
Fax, skannari, printari og kopimaskina í einum.
Alt í litum.
**kr. 4.900,-**

**FARODANE City**
SKRIVSTOVUMARKNAÐUR
SMYRILSVEGUR 7 - FO-100 TÓRSHAVN - TEL: 31 14 14


## Reingerðarfólk til tannlæknastovu

Søkt verður eftir reingerðarfólki til kommunalu tannlæknastovuna at byrja beinanvegin. Starvið er tveir tímar um dagin mánadag-fríggjadag.

Umsóknirnar skulu sendast til Tvøroyrar Kommunu og skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 2. september.

**Tvøroyrar Kommuna**
Postboks 80
FO-800 Tvøroyri
Tlf. 371085

## Bakaralærlingur

Okkum tørvar ein raskan bakaralærling. Eisini tørvar okkum ein raskan drong/mann at hjálpa okkum í summar. Hevur hettar tín áhuga so ring ella skriva til:

**Pf. Frants Restorff**
Tórsgøta 13 · Postsmoga 41
110 Tórshavn · Tlf. 31 10 60

**frants restorff**

## Lýsing eftir dagrøktara

Søkt verður eftir dagrøktara til kommunalu dagrøktina í Oyndarfjarðar kommunu at byrja tann 10. september 2002.

Ein treyt fyri at søkja starvið er, at dagrøktarheimið skal verða barnavinarligt innrættað, har rúm er til børnini at spæla, og at eitt hóskandi trygt spæliøki er uttanfyri.

Annars arbeiðir kommunan við at fáa møguliga spælistovu til vega, har dagrøktararnir saman við børnunum í ansingini kunnu verða partvísa tíð.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag fyri dagrøktarar, og er henda hesum ásett eftirlønaraldri pr. 01. januar 2001 til kr. 2.947,37 fyri hvørt barni fulla tíð. Av skattskyldugu inntøkuni verður harumframt goldið til lívstryggingar- & eftirlønarskipan hjá Føroya Arbeiðarafelag 3,8%.

Anciennitetshækking fer fram fyri hvørt fulla ár í starvi.

Av nevndu upphædd verðu 1/3 at rokna sum skattafrí veiting fyri slit av heimi vm. sambært grein 5, stk. 7.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Eriku L. Petersen, dagrøktarleiðara á telefon 444783.

Skrivligar umsóknir skulu verða Dagrøktini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 6. september 2002 kl. 16.00.

Dagrøktin skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Oyndarfjørður, tann 22. august 2002
**Dagrøktarskipanin**
**í Oyndarfjarðar kommunu**

## Príslækking á pappi og pappíri til endurnýtslu

Frá 1. september 2002 eru fylgjandi prísir galdandi fyri turt og reint papp og pappír til endurnýtslu.

| Tilfar | kr/m3 |
|---|---|
| Bara papp, heintað | 90,00 |
| Bara pappír, heintað | 90,00 |
| Blandað pappír og papp, heintað | 120,00 |

- Pappír er tíðindabløð, vikubløð, tíðarrit, lýsingarbløð, kopipappír og annað reint pappír.
- Papp er pappeskjur og annað reint, turt og óviðgjørt bylgjupapp ella kartonpapp.
- Prísirnir eru fyri leyst papp og pappír. Leysprísurin verður faldaður við 3, um papp ella pappír eru samantrýst.
- Avtalað kann gerast um levering av pappi ella pappír.
- Meira fæst at vita um burturkast á www.irf.fo

IRF

## Skrivstovufólk

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Akfaraskránna til setan so skjótt sum gjørligt. Talan er um eitt tíðaravmarkað starv, ið er skipað sum eitt 1/2 ársverk.

**Uppgávur:**
Landsstýrismaðurin í Vinnumálum fer ætlandi í næstum at áseta, at øll prutl skulu skrásetast. Í hesum sambandi verður søkt eftir fólki til hesa uppgávu. Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðsla av viðskiftafólki
- Framleiðslu og útflýggjan av nummarspjøldrum
- Eftirkanning av kravdum skjølum
- Kunning av viðskiftafólki um átakið

**Førleikakrøv:**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á góð samstarvsevnir og at viðkomandi er fyrikomandi. Tað er ein fyrimunur um viðkomandi hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

**Setanartreytir:**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetananin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráðir.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til tlf. 350400 og tosað við Jákup Jacobsen, stjóra. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum, skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 9. september 2002.

**BILEFTIRLIT FØROYA**
**Hoyvíksvegur 57**
**Postsmoga 3206**
**FO-110 Tórshavn**

*Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kunningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólko koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskrásetingina og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Bileftirlitið sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 18 fólk.*

## Fólk til matframleiðslu

Til skundverða framleiðslu okkara, søknast vit eftir fólki til at byrja skjótast gjørligt.

Áhugað kunnu venda sær til P/F Poul Michelsen á telefon 31 46 50 og spyrja eftir Claus Mørkøre.

**P/F Poul Michelsen**

## Sølufólk søkist

Søkt verður eftir fólki til at standa í sølubúðini umborð á M/F Ternan.

Arbeitt verður í skiftivakt.

Byrjast kann skjótast gjørligt. »Góð løn«.

**Áhugað kunnu ringja á tlf. 211099**